## DAGSINS MEINING

# Samferðsla og útoyggjar

Norðoyartunnilin er eitt stórt frambrot fyri allar Norðoyggjar íroknað útoyggjarnar har norðuri. Nú um dagarnar hevur verið tos um, at útoyggjaviðurskiftii mugu betrast. Hetta sjónarmið er væl skilligt, men vit mugu ansa eftir, at man ikki kjakast á einum órealistiskum grundarlagi.

Vit sóu fyri nøkrum árum síðani eitt útoyggjaálit, ið var á tremur við góðum intentiónum, men tað var kanska ikki líka fult í realismu. At búgva á útoyggj verður ongantíð tað sama sum at búgva á meginøkinum. Tey, ið vilja búsetast á útoyggj, gera tað, tí okkurt annað enn høgligt ferðasamband dregur. Tað fer ongantíð at verða so, at man búsetist á útoyggj, tí tað loysir seg. Tað vil altíð verða náttúran, heimstaðurin, friðurin o.s.fr., sum dregur.

Tá hetta er sagt, so er tað skyldan hjá samfelagnum at tryggja eitt líkinda samband til hesar útoyggjar. Tað hevur seinastu árini verið gjørt við regluligum sambandi sjóvegis og við tyrlusambandi. Tyrlan man eiga lívið í meiri enn einari útoyggj, og er hon eitt gott dømi um, hvussu man við einum skilagóðum samferðslupolitikki heldur lív í útoyggjum. So leingi sum fólk vilja búleikast á hesum plássum, so hevur samfelagið skyldu til at tryggja hesum fólkum eitt líkinda ferðasamband, streym, telefonsamband og almennar tænastur annars. Tað er órealistiskt at halda, at vit kunnu blása lív í útoyggjarnar við almennum verkætlanum av ymsum slag, tá fólkið, ið er uppvaksið á hesum oyggjum flyta frá teimum. Politikkurin eigur at verða, at so leingi fólk er har, so skulu tey fáa tær almennu tænastur, tey hava krav uppá.

Tað, sum júst er hent við farmakleiðum, er helst eitt afturstig fyri útoyggjarnar. Tað er spell, tí hóast man ikki frá almennari síðu er so forferdiliga ekspansivur viðvíkjandi útoyggjunum, so er tað ikki rætt í hesum døgum, har tunnlar og annað raplar úr tí almenna, at beinleiðis lækka tænastustøðið á útoyggj.

Tað er eitt fátækt land, ið ikki er nóg stórt í sinni til at tryggja, at korini eru rímilig í útjaðaranum. Her tosa vit ikki um studning av kunstigum verkætlanum, men bert um almennar tænastur og flutning. Okkara áheitan skal verða á politikarnar at hyggja at avleiðingunum av tí, sum júst er hent við Farmaleiðum og bera so í bandi, at korini á útoyggj ikki versna. Hóast avmarkað er, hvat kann hækkast viðvíkjandi útoyggjajáttanum, so kann afturstig ikki góðtakast.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Til tíðindideild Útvarpsins

**SÚSANNA DANIELSEN**
Løgtingsstjóri



Í útvarpinum á miðdegi 4. mai 2006 segði løgmaður í samrøðu við Dagmar Joensen - Næs um Hoyvíkssáttmálan, at landsstýrið upprunaliga ætlaði at leggja sáttmálan fram sum uppskot til samtyktar og av øllum alvi royndi at fáa tey uppskot við, sum vóru neyðug, men tók fyrivarni fyri, at okkurt neyðugt lógaruppskot ella ríkislógartilmæli manglaði, men tað helt Løgtingsskrivstovan ikki vera nøktandi. Vanlig mannagongd er, at samskifti millum Løgtingumsiting og uppskotssetara, áðrenn mál verða løgd fram, ikki kemur ament fram, men nú løgmaður leggur ábyrgdina fyri gongdini í málinum á umsiting Tingsins, loyvi eg mær at koma við hesi lítlu frágreiðing.. Sambært tingskipanini § 22, stk. 1 ansar Løgtingsskrivstovustjórin m.a. eftir, at øll tingmál eru løgfrøðiliga røtt. Uppskot til samtyktar um at seta Hoyvíkssáttmálan í gildi kom á skrivstovu Tingsins umleið 20. september seinasta ár. Tá hugt var eftir uppskotinum, varð greitt, at uppskotið ikki var sambærligt við § 52, stk. 3 í stýrisskipanarlógini, sum er soljóðandi: "§ 52. Stk. 3. Samstundis sum slík avtala verður løgd fyri løgtingið til góðkenningar, boðar landsstýrið frá, hvørjar løgtingslógir og hvørji ríkislógartilmæli, neyðug eru, til tess at millumlandasáttmálin kann verða útintur." Orsøkin var, at tað við einum hálvum eyga sást, at yvirliti yvir tær lógir og tey ríkistilmæli, sum vóru neyðug fyri at sáttmálin kundi verða útintur, var ófullfíggjað, og Løgtingsumsitingin helt ikki, at eitt generelt fyrivarni var nógmikið sambært regluna í § 52,stk.3. Løgmansskrivstovan var gjørd varug við henda trupulleikan, og viðurkendi henda. Síðan fór fram nógv orðaskifti umvegis telefon, og nógvir teldupostar vóru sendir aftur og fram, og var endin, sum vit øll vita tann, at sáttmálin var lagdur fyri Tingið sum lógaruppskot tann 19. oktober 2005. Á henda hátt var sloppið uttan um regluna í § 52, stk. 3 í stýriskipanarlógini og slapst eisini undan, at fara gjøgnum alt lógarverkið at kanna um hvørjar broytingar skuldu gerast í sambandi við at sáttmálin kom í gildi, tí við at gera hann til lóg vórðu lógirnar samstundis broyttar, og var sloppið undan vandanum fyri møguligari landsstýrismannaábyrgd um okkurt varð gloppið burtur ímillum. Løgmaður vísti í samrøðuni eisini á, at reglan um burturvísn eftir § 57 stk. 1 ikki var brúkt. Við at loypa uppum regluna í § 52, stk. 3 og leggja málið fram sum lógaruppskot var eisini sloppið undan, at málið var viðgjørt eftir reglunum um burturvísn, tí lógaruppskotið var ikki beinleiðis í stríð við tær reglur, sum sambært § 57 stk. 1 pkt. 1-4, sum kunnu leggjast til grund fyri at mæla Tigninum til at vísa málum burtur. Reglan í § 57, stk. 1 kann bert brúkast um mett verður, at eitt uppskot greitt er í stríð við tær reglur, sum eru nevndar har, men tað at uppskot ikki koma undir hesa reglu er ongin trygd fyri góðum lógarsmíði og lógargóðsku. Løgtingið 4. mai 2006

# Tað er í lagi, at Føroya Tele sleppur - og....?

**FRÍÐÁLVUR JENSEN**



- Nú má politiski myndugleikin siga okkum, um tað er verulig kapping á jøvnum føti, ella hesi ikki rættiliga meina, at borgarin skal hava ágóðan av einskiljingartilgongdini..

Hví vilja vit hava, at almennar fyritøkur verða settar á sølulista og verða bjóðaðar út til sølu á almenna sølumarknaðinum.

Eg veit væl, hvat tað merkir, at nú skal borgarin fáa tænastur fyri rætta prísin – heilt einfalt merkir tað, at tú fer inn til teir ymsu útbjóðararnar og spyr eftir tí tú ynskir, og so er tað bara spurningurin, hvat tann ávísa vøran ella tænastan kostar – "that´s it".

Og so kunnu vit spyrja – er tað rætt og rímiligt, at ein almenn fyritøka kann sleppa at bjóða á jøvnum føti við aðrar privatar, tá hesar ikki hava sama kapitalin at spæla sær við?

NEI! – tað er ikki rætt, at hesar skulu hava sama møguleikin, tí tað er júst tað, at verða almennar fyritøkur leysgivnar, er tað borgarin sum fær ágóðan – og ongin annar!

Hvat skal veruliga endamálið annars verða, um vit bara siga, at vit velja politiskt at liberalisera bara fyri at liberalisara – HVØR SKAL HAVA ÁGÓÐAN?

Meina tit, at nú skulu vit hava kapping, sum kann standa seg á jøvnum føti bæði her á klettunum og úti í stóru verð; so mugu tit boða greitt frá, at endamálið við einskiljingartilgongdini er, at vit hava vørur og tænastur fyri tann prísin, sum privati marknaðurin kann bjóða!

Annars, er tað væl ongin meining í at einskilja almennu fyritøkurnar...?

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.